www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 03 - 2012

# Gassleki - Shell flytur nú eisini fólk av palli

Bretskir myndugleikar hava nú givið skipum og tyrlum forboð fyri at koma ov tætt upp at Elgin pallinum í Norðsjónum, har ein gassleki er staðfestur. Allar manningarnar, 323 í tali á trimum oljupallum í Norðsjónum eru fluttar til lands, eftir at ein gassleki sunnudagin varð uppdagaður umborð á Elgin pallinum 240 kilometrar eystan fyri Aberdeen. Tað er oljufelagið Total, sum rekur pallarnar. Sambært norska umhvørvisfelagsskapinum Bellona hevur oljufelagið mist tamarhaldið á lekanum og fer lekin at standa við í drúgva tíð sigur Bellonaleiðarin Frederic Hauge við NTB. Soleiðis sum vit síggja støðuna í løtuni, tykist tað at vera sera torført at steðga lekanum, so støðan er álvarslig sigur Hauge. Total sigur í eini viðmerking, at gass framvegis lekur frá pallinum men at støðan í løtuni er stabil. Vit gera alt vit kunnu fyri at finna orsøkina til lekan og steðga honum. Seinasta nýggja er, at Shell, sum hevur ein pall í grannalagnum, hevur flutt umleið 90 av sínum fólkum av palli til lands av ótta fyri at nakað skal henda í økinum. Eitt stórt gassskýggj hevur lagt seg yvir part av økinum. Total sigur í eini viðmerking seint týsdag, at tað kann taka drúgva tíð at basa lekanum. Bretskir myndugleikar hava sett skipum forboð fyri at koma nærri enn 3, 5 kilometrar pallinum og flogferðslan hevur eisini fingið boð um at halda seg burtur frá økinum av ótta fyri spreinging. Sum skilst hevur Total hava stórar trupulleikar við Elgin gassleiðini bæði í 2005 og aftur nú, og tí var avgjørt at stongja niður framleiðsluna, men kortini heldur gass fram við at leka. Sum skilst er sera stórt trýst í gasskelduni.